# Kjak



**Mortan Johannesen**
*Fyri Suðurstreymoyar útróðrarfelag*

## Ein áheitan til Landsstýrismannin í Fiskivinnumálum

Nú er so bólkur 5 skorin við 4000 døgum, hetta havi eg sum so onga viðmerking til. Hvar hesir 4000 dagar verða tiknir frá, veit eg ikki, men óivað úr bólki 5B.

Hetta kann hava rættiliga ringar fylgjur fyri ein útróðrarmann sum er í bólki 5B. Tað eru nógvir menn runt landið, við familju og húsum, sum arbeiða 1-3 dagar t. d. á einum flakavirki, men tá ein ikki kann liva av hesum, tá er gott at hava ein útróðrarbát í bólki 5B, sum man kann lívbjarga sær og familjuni við, so kemur tann brennandi spurningurin, um allir hesir dagar í bólki B eru brúktir, so eru hesir menn í dýrastu neyð, teir mugu gevast at fiska og hava ikki møguleika at koma í bólk A, tá ein ikki kann forvinna meir enn kr. 50.000 uttan fyri útróður. Hetta er eisini galdandi fyri teir útróðrarmenn, sum eru 67 ára gamlir og pensioneraðir, teir verða koyrdir í bólk 5B sjálvt, um man hevur fiska seg uppí bólk A.

Í hesum sambandi heita vit á landsstýrismannin í Fiskivinnumálum um at lække gáttina fyri forvunna upphædd úr kr. 50.000 til kr. 120.000-150.000, so at hesir umrøddu menn, kunnu koma upp í bólk 5A. Har teir sjálvir kunnu ráða yvir teimum døgum, teir fáa tillutað, og á hendan hátt lívbjarga sær.

Hetta broytir onki upp á veiðitrýstið, men skilir teir frá, sum hava tað sum livibreyð og hinir, ið ikki hava tað fyri neyðini. Vit skulu øll verða varug við, at heimaútróður er ein doyggjandi vinna, bert heilt fáir ungdómar hava hetta sum livibreyð, og tí er heimaútróður næstan bara hildin uppi av eldri monnum, yvir og undir pensiónsaldur.



**Bjørn Kalsø**
*løgtingsmaður*

## Gerard leggur fólki orð í munnin

*Í firtni um lógaruppskot um at lækka talið av tinglimum, leggur Gerard Lognberg mær orð í munnin í greinastubba*

Gerard skrivar: *"Hann(Bjørn Kalsø) segði við Kringvarpið, at hetta at lækka tingmanningatalið, var ikki fyri at spara pening, tá dottu argumentini hjá manninum á gólvið.*

*Jú, helt hann fram, tað var betur at minka talið, tí tað vóru ikki so nógvar meiningar tá. Bjørn Kalsø, er tað tín hugsan bara at lukka nakrar munnar á tingi, so er tú ikki ein, sum vil demokrati"*

Annahvørt hevur Gerard ikki lurtað nóg væl, ella verða orð løgd mær í munnin við vilja. Tí hesa stuttu rættleiðing:

Tað eg segði við Kringvarpið var, at spardi peningurin við at lækka talið á tinglimum ikki var einasta grundgevingin fyri at leggja uppskotið fram.

Eg nevndi, at vit fóru at fáa eina e¨ffektivari og minni rúgvusmikla politiska skipan, har arbeiðið á Løgtingi fór at verða lyft á eitt hægri støði. Lagt varð afturat, at vónandi fór broytingin at seyra ígjøgnum alla almennu skipanina, soleiðis at vit samanlagt fóru at fáa eina effektivari, bíligari og minni rúgvusmikla umsiting í framtíðini. (Hetta átti at verið søtur tónleikur í oyrunum á Gerardi).

Somuleiðis nevndi eg, at við 25 tinglimum fór ikki at verða gingið fólkaræðinum ov nær, tí pláss fór framvegis at verða fyri øllum meiningum á Løgtingi.

Restina av stubbanum hjá Gerardi havi eg ongar viðmerkingar til, tí har verður farið eftir manninum heldur enn bóltinum.



**Helgi Abrahamsen**
*løgtingmaður*

## Nú má Hans Pauli Strøm halda uppat

Tað er syndarligt at síggja, tá fráfarnir landsstýrismenn seta sær sum fremsta mál, at seta eftirkomaran í sessinum í ringt ljós, men hetta fyribrigdið sær tíverri út til at hava rakt Hans Paula Strøm serliga meint. Hansara fremsta endamál í almenna kjakinum, er at finnast at øllum avgerðum hjá landsstýriskvinnuni Rósu Samuelsen. Seinasta dømi um hetta sóu vit í sambandi við ætlaðar sparingar á ellis- og røktarheiminum á Tvøroyri.

### Søgan um eitt eldrasambýli

Fyri nøkrum árum síðani gjørdi kommunan, har eg sjálvur búgvi (Sjóvar kommuna) eitt stórt arbeiði, fyri at fáa eitt eldrasambýli í bygdini. Eg var sjálvur ikki tingmaður tá, men av tí at eg var skrivari hjá einum politiskum flokki, vendu bygdaráðslimir sær ofta til mín, í eini roynd at koma á tal við landspolitikarar um hetta málið. Tað kom eisini so langt, at uppskot varð lagt fyri tingið, um nevndu ætlan.

Landsstýrismaður í almannamálum tá var Hans Pauli Strøm. Hann helt fast við, at tað bar ikki til at geva tilsøgn um stuðulslán til eina kommunu í Eysturoynni, tí sum eldraøki var øll Eysturoyggin at rokna sum eitt øki, og í hesum økinum var akutti tørvurin nøktaður. Tað hevði ongan týdning, sambært landsstýrismanninum, um tørvurin í eini einstakari kommunu ikki var nøktaður. Øll oyggin skuldi roknast sum eitt øki.

### Máttu bíða, men fingu einki

Sjóvar kommuna noyddist tí at bíða til næstu útbjóðing av játtanum, men nú tann rundan var, fall eingin játtan til Eysturoynna, tí tørvurin sigst framvegis vera ov lítil.

Eg skilti- og skilji framvegis væl sjónarmiðið um, at játtanin skal falla har, sum tørvurin er størstur, men nú sær út til, at Hans Pauli Strøm hevur kúvent.

### Eru ikki øll øki líka?

Suðuroyggin verður, eins og Eysturoyggin, roknað sum eitt eldraøki. Har er eitt ellis- og røktarheim og trý eldrasambýli. Um fáar mánaðir opnar eitt nýtt ellis- og røktarheim í Vági, har pláss verður fyri 24 búfólkum. Tá tað heimið er opnað, verður akutti tørvurin í Suðuroynni nøktaður – eisini um ætlaðu broytingarnar á Tvøroyri verða framdar.

Men Hans Pauli Strøm sigur nú, at hann kann als ikki góðtaka nakra broyting á Tvøroyri. Suðuroyggin skal við øðrum orðum hava aðrar treytir enn restin av landinum.

### Eiga ikki at seta økini uppímóti hvørjum øðrum

Nú skal eg ansa eftir, hvat eg sigi um hetta, tí vit eiga sjálvsagt ikki at seta økini uppímóti hvørjum øðrum, og sjálvandi skal Suðuroynni verða unt góðar umstøður á eldraøkinum. Men vit tosa um at spara, tí at pengar mangla, og tá ber ikki til at pilka eitt øki burturúr.

Ætlanin hjá Rósu Samuelsen er ikki at lata ellis- og røktarheimið á Tvøroyri aftur. Har verður eingin rikin á dyr, men har verður heldur eingin nýggjur tikin inn, so hvørt sum plássini tømast, tí tey sum koma afturat, skulu inn á nýggja heimið í Vági, og tørvurin í Suðuroynni verður nøktaður.

Um hetta er nóg mikið til at Hans Pauli Strøm vil seta samgonguna uppá spæl, so velji eg at trúgva, at okkurt heilt annað býr aftanfyri.

### Stríð ímillum tvey kongaríki

Tað sum eg als ikki skilji við viðmerkingunum hjá Hans Paula Strøm er, at hann mælir til, at landið keypir eldrasambýlið í Vági og skipar tað sum deild undir ellis- og røktarheiminum á Tvøroyri, heldur enn at flyta fólk av Tvøroyri á ellis- og røktarheimið í Vági. Hetta virkar sum eitt meiningsleyst stríð ímillum tvey kongaríki, har endamálið er heilt eitt annað, enn at veita búfólkunum eina góða tænastu.